## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landnyrðingi, seinnapartin nakað minni vindur. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, seinnapartin minni vindur. Sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi ella av ymsum ættum. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 11 og 15 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR

# "Eg havi eitt spennandi arbeiði"

**39 ára gamli Bergur Viderø arbeiðir sum landmálsteknikari hjá KT-fyritøkuni Munin. Her gera tey bæði størri og smærri uppgávur, m.a. gjørdu hann ein støðuplan í miðbýnum í Havn í morgun.**

*Dagsins føroyingur*
*Orð&mynd: Snorri Brend*

**Hvussu leingi hevur tú arbeitt sum landmálsteknikari?**
- Eg havi arbeitt sum slíkur í 20 ár. Hjá Munin er talan um eitt rættiliga fjølbroytt arbeiði, har vit m.a. gera uppmátingar og avsetingar og framleiða 3D-myndlar út frá lendisdáta kring alt landið.

**Hvat er serstakt við tínum arbeiði?**
- Hetta er eitt sera spennandi og fjølbroytt arbeiði. Tað er spennandi, tí ein allatíðina arbeiðir við nýggjari tøkni. Hinvegin so er ein nógv úti og arbeiðir, og her fái eg fríska luft og møti nógvum fólki

**Hvat ger tú í frítíðini?**
- Eg hugni mær saman við familjuni. Mær dámar eisini væl at ganga túrar og njóta náttúruna.

**Hevur tú verið uttanlands í summar?**
- Nei, ikki enn. Men vit fara fríggjadagin til Danmarkar.

**Hvørjum vilt tú heilsa?**
- Eg vil fegin heilsa familju, vinum og kenningum.




*Bergur Viderø er ættaður av Sandoynni, býr á Viðareiði og arbeiðir sum landmálsteknikari í Havn*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 13 |
| Qaqortoq | 15 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 16 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 23 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 30 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 18 |
| New York | 29 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 14 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1007 hPa. vestan fyri Føroyar fer í landsynning. Eitt annað lágtrýst, 994 hPa. við Álandsoyggjarnar fer vestureftir og brúgvalagið haðani verður við Føroyar mikudagin.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Hetland fer spakuliga í útsynning og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum komandi samdøgur.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 14/8 kl. 06[00]– 15/8. 06[00]. Hitin í gjár: 10,2°
Minsti hiti máldur í august: 0,2° - Mesti hiti máldur í august: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 14/8 kl. 06[00]– 15/8 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 27,8 mm

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com

www.sosialurin.fo




## VESTFALLSKYRRINDI

10. august Mánin næstur jørðini
16. august Seinna kvarter
26. august Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 15. Aug | - | 12.05 | 11.05 | - | 11.20 | - | 01.41 | 14.05 | 02.41 | 15.05 | 10.20 | 23.19 | 09.20 | 22.19 | - | 12.20 | 00.56 | 13.20 | 11.50 | - | 00.41 | 13.05 |
| 16. Aug | 01.04 | 13.23 | 00.04 | 12.23 | 00.19 | 12.38 | 03.04 | 15.23 | 04.04 | 16.23 | 11.38 | - | 10.38 | 23.41 | 01.19 | 13.38 | 02.19 | 14.38 | 00.49 | 13.08 | 02.04 | 14.23 |
| 17. Aug | 02.26 | 14.44 | 01.26 | 13.44 | 01.41 | 13.59 | 04.26 | 16.44 | 05.26 | 17.44 | 00.41 | 12.59 | 11.59 | - | 02.41 | 14.59 | 03.41 | 15.59 | 02.11 | 14.29 | 03.26 | 15.44 |
| 18. Aug | 03.11 | 15.38 | 02.11 | 14.38 | 02.26 | 14.53 | 05.11 | 17.38 | 06.11 | 18.38 | 01.26 | 13.53 | 00.26 | 12.53 | 03.26 | 15.53 | 04.26 | 16.53 | 02.56 | 15.23 | 04.11 | 16.38 |
| 19. Aug | 04.05 | 16.32 | 03.05 | 15.32 | 03.20 | 15.47 | 06.05 | 18.32 | 07.05 | 19.32 | 02.20 | 14.47 | 01.20 | 13.47 | 04.20 | 16.47 | 05.20 | 17.47 | 03.50 | 16.17 | 05.05 | 17.32 |

5 707265 100036 >